PRIX 05

# SEKS BÓLKAR VERÐA VIÐ Í 2. INNLEIÐANDI UMFARI Í MENTANARHÚSINUM Í FUGLAFIRÐI LEYGARKVØLDIÐ 12. FEBRUAR KL. 20.00

## ALL THAT RAIN



**Rókur Jákupsson Jakobsen**
- sang og gittar
**Jens Tummas Næss**
- bass og sang
**Hans Ravnsfjall**
- gittar og sang
**Henning Nicodemussen**
- trummur og sang

Bólkurin All That Rain varð stovnaður í desember mánað í 1999. Allir teir tríggir upprunaligu limirnir í bólkinum, høvdu verið partur av Kjølum frammanundan.

Fyrstu tíðina var tað gittarspælarin Jens Marni Hansen, sum sang í bólkinum, og hann er eisini oddafiskur á tí mesta av útgivnað tónleikinum hjá bólkinum.

Í august mánaði 2001 fór Jens Marni úr bólkinum, og síðani hava tríggir sangarar roynt seg. Fyrst var tað nýggi gittarspælarin Hans Ravnsfjall, sum sang og spældi, síðani kom fyrrverandi sangarin í Týr, Pól Arni Holm, upp í bólkin, og síðstu mánaðirnar hevur Rókur Jakobsen verið sangari í bólkinum. Hann hevur áður roynt seg í eitt nú Tangz og MC Hár.

All That Rain endaði nummar tvey í Prix Føroyum 2001, men teir vóru ikki við fyri tveimum árum síðani.

All That Rain spælir rocktónleik, og nú eru teir farnir at syngja á føroyskum burturav.

## MAKREL



**Ári Rouch**
- sang og keyboard
**Rasmus Rasmussen**
- gittar
**Rólant av Reyni**
- gittar
**Magnus Hansen**
- trummur
**Hergeir Staksberg**
- bass

Rockbólkurin Makrel hevur gingið sínar egnu leiðir síðstu árini. Bólkurin hevur verið serstakur í føroyskum tónleiki, og tær báðar útgávurnar hjá bólkinum hava víst ein bólk, sum hevur funnið sín egna stíl – harður, men melodiøsur rocktónleikur við einum eyðkendum tóna.

Makrel hevur spælt til nógvar konsert herheima, og teir hava eisini verið á ferð uttanlands. Teir hava spælt í Íslandi, og tvær ferðir hava teir verið á palli á spælistaðnum Vega í Keypmannahavn.

Makrel royndi seg til Prix Føroyar fyri tveimum árum síðani, og tá endaðu teir sum nummar trý í kappingini og fingu umvegis kappingina møguleikan at spæla uttanlands.

Aftur í ár ætlar Makrel sær uttanlands at spæla, og okkurt er upp á tal til páskirnar og aftur í summar.

## MMM



**Alice Simonsen**
- sang
**Tórfríð Davidsen**
- sang
**Terji Johannesen**
- gittar
**Jóhan Mikkelsen**
- gittar
**Uni Svabo Joensen**
- bass
**Høgni Ole-Jacobsen**
- trummur
**Marit Jacobsen**
- keyboard

Vit eru Mmm og vit spæla melodiøsan rock. Vit hava spælt saman í fleiri ár, tó við ymiskum útskiftingum her og har.

Bólkurin varð stovnaður í 1996. Síðani hevur manningin skift eitt sindur. Bólkurin byrjaði við tveimum forsangarum, fyri tveimum árum síðani var bara Alice í front, men nú er aftur tveir sangarar í bólkinum – Alice og Tórfríð.

MMM hevur verið við í tveimum teimum seinastu Prixnum, men uttan at koma víðari frá teimum innleiðandi umførunum. Nú royna tey seg aftur.

Bólkurin spælir melodiøsan rocktónleik við andaligum tekstum.

## PH 5,5



**Rannvá Jacobsen**
- sang
**Guðrið Hansen**
- sang og kassagittar
**Halltóra Henriksen**
- ljómborð
**Heðin Ziska Davidsen**
- el-gittar
**Niels Jákup í Jógvansstovu** - bass
**Brandur Jacobsen**
- trummur

pH 5,5 er ein nýggjur bólkur, um varð stovnaður í desember mánaði í fjør. Hóast onkrir av tónleikarunum í bólkinum hava drúgvar royndir í føroyskum tónleiki, so er talan um eina nýggja samanseting av tónleikarum.

Teir tríggir tónleikararnir, sum leggja botnin í bólkinum, hava allir spælt í øðrum bólkum. Heðin Ziska Davidsen er millum fremstu gittarspælararnar her á landi, og Brandur Jacobsen er dugnaligur trummuspælari, sum hevur givið fløgur út sjálvur. Niels Jákup í Jógvansstovu hevur áður roynt seg sum bassspælari í Prixnum.

Afturat teimum eru tríggjar kvnnur við í bólkinum. Rannvá Jacobsen og Guðrið Hansen syngja, meðan Halltóra Henriksen spælir ljómborð.

Teir spæla tíonleik, sum hevur fingið íblástur frá reggae, fólkatónleiki, blues, jazzi og eisini meira hørðum rocktónleiki.

Rannvá og Guðrið hava skrivað orð og løg, meðan øll í bólkinum hava verið við til at leggja tónleikin til rættis.

## RÓP



**Heri Trondesen**
- sang
**Rókur Heinesen**
- gittar
**Símun Skorastein**
- gittar
**Chris Shields**
- bass
**Christian Djurhuus**
- trummur

Bólkurin Róp hevur verið til í umleið eitt ár, og teir hava spælt til konsertir í millum annað Losjuni í Gøtu, í Norðurlandahúsinum og á G! festivalinum.

Tónleikararnir í bólkinum hava áður spælt við í øðrum bólkunum – eitt nú var bassspælarin Chris Shields við í rockbólkinum Krit í Prixnum fyri tveimum árum síðani.

Sangari í bólkinum er Heri Trondesen, sum eisini hevur roynt sína rødd í øðrum bólkum.

Tað verður sagt, at Róp spælir harðan atmosferiskan rocktónleik – hørð riff og ja... róp. Men alt er blandað við vøkrum, mangan sorgblíðum løgum og sangi.

## SIDE EFFECT



**Brynjolfur á Heygum**
- syntheseizer, sampler, arr.
**Ludvík Breckmann**
- vokal
**Rúni Christiansen**
- gittar
**Sigurd Justinussen**
- trummur (live)

Bólkurin Side Effect var stovnaður í 1999. Hann var við í Prix Føroyum bæði í 2001 og í 2003. Hvørgu ferðina kom bólkurin víðari frá innleiðandi umfarinum, hóast hann var mettur sum slóðbrótandi í fyrru kappingini.

Bólkurin hevur skift manning fleiri ferðir síðstu árini, men høvuðsmenninir í bólkinum eru teir somu hesaferð, sum teir vóru fyri tveimum árum síðani.

Brynjolfur á Heygum stendur fyri tí nógva av tónleikinum, meðan Ludvík Breckmann leggur rødd til tónleikin.

Side Effect hevur spælt techno-tónleik, men hesaferð fara teir at spæla nakað harðari tónleik – teir kalla tað industriellan elektroniskan rock í tí heilt harða endanum.

Tað hevur ikki verið so nógv at hoyrt til bólkin, síðani hann var við í Prixnum fyri tveimum árum síðani, men nú kemur hann undan kavi aftur.